UTTAN ÚR HEIMI

## Løgreglumaður var tjóvur

Ein løgreglumaður í Svøríki er settur í varðhald og skuldsettur fyri bankarán og fleiri onnur brotsverk.

Tann 17. desember í fjør rændi ein maðåur í gekkaskorti ein banka í Søderhamn, har tað eydnaðist honum at ræna fitt av pengum. Løgreglan sendi eitt væl mannað lið at leita eftir ránsmanninum, men løgreglumenninir vistu ikki, at ránsmaðurin var teirra millum. Nú er tann 36 ára gamli løgreglumaðurin tikin og varðhaldsfongslaður. Hann er skuldsettur fyri bankaránið í Søderhamn, men harafturat hava kanningar avdúkað ymiskt annað, og tí er hann eisini skuldsettur fyri hóttanir, bilstuldur og svik, skrivar Aftonbladet.

-Hetta hevur skelkað okkum øll, og vit fata ikki, at hann kundi hetta hetta ímóti sínum starvsfeløgum, sigur løgregluovastin í Søderhamn, Sten Sundqvist, við blaðið.

## Clinton verður ST-umboð

ST-høvuðsskrivstovan í New York kunngjørdi í gjár, at fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton skal virka sum ST-umboðsmaður í sambandi við hjálparарbeiðið eftir flóðalduna í Suðurasia.

Síðani hann fór úr forsetaembætinum, hevur Bill Clinton verið virkin í ymsum vælgerðararbeiði. Eitt nú hevur hann lagt nógva orku í bardagan ímóti fátækradømi kring heimin, og hann hevur savnað væl av pengi til stríðið ímóti ymsum sjúkum í Afrika.

Seinasta heyst fekk fyrrverandi forsetin trupulleikar við hjartanum og mátti leggjast undir skurð, men seinastu mánaðarnar hevur hann aftur tikið lut í fleiri tiltøkum. Hann var millum annað ein av røðarunum á politisku og búskaparligu ráðstevnuni í Davos í síðstu viku.

## Turrur januar

Tað kom ikki so frægt sum ein einasti dropi av himli í portugisiska høvuðsstaðnum Lisboa í síðsta mánað, og sambært veðurmonnunum hevur januar ikki verið so turrur har í meiri enn hundrað ár. Hagtølini vísa, at í januar í 1901 kom heldur eingin dropi av himli í Lisboa.

Portugisisku veðurmenninir siga, at verður hugt at øllum landinum, regnaði tað umleið 20 prosent minni í januar í ár enn vanligt. Harafturat hevur veturin verið rættiliga lýggjur við nógvari sól, og tað hevur havt við sær, at nú er lítið vatn eftir í vatnbrunnunum nógvastaðni, skrivar Reuter úr Lisboa.

Enn hava myndugleikarnir ikki gjørt av, um teir skulu seta mark fyri, hvussu nógv vatn fólk skulu brúka, men sagt verður, at teir halda eyga við støðuni.

## Fílur traðkaði á venjaran

Ein 40 ára gamal amerikanskur djóravenjari doyði mánadagin, tá ein fílur traðkaði á hann.

Maðurin var djóravenjari í einum sirkusi í býnum Fort Wayne í statinum Indiana. Hann hevði verið og vant saman við fílinum, men tá hann skuldi koyra fílin inn í eitt rúm, hendi vanlukkan, skrivar AP. Av einari ella aðrari orsøk traðkaði fílurin á mannin, sum doyði alt fyri eitt. Larry Solheim, sum eigur sirkusið í Fort Wayne, sigur við tíðindastovuna, at tann 40 ára gamli maðurin og fílurin kendust væl, tí maðurin hevði verið venjari hjá fílinum í fleiri ár.

Tilburðurin í Fort Wayne er ikki óvanligur. Sambært einum felagsskapi, sum er ímóti at nýta villdjór í sirkusi, vóru fílar orsøk til 65 slíkar tilburðir í árunum frá 1990 til 2003.

# USA úr Irak um eitt ár



**Irakski forsetin heldur, at teir útlendsku hermenninir kunnu takast úr landinum um eitt ár**

IRAK
*Árni Joensen, fartekst@mail.dk*

Tað væleydnaða tjóðartingsvalið sunnudagin og ikki minst tað, at tað eydnaðist at forða uppreistrarmonnunum at steðga valinum, hevur fingið irakar at tosa um, at nú kunnu teir útlendsku hermenninir fara heimaftur.

Men irakski forsetin, Ghazi al-Yawar, heldur ikki, at stundin er komin enn.

-Tað hevði verið púra burturvið at sagt, at hermenninir skulu fara av landinum nú. Okkum tørvar hjálp frá teimum til at menna okkara egnu trygdardeildir, men eg rokni við, at síðst í hesum árinum kunnu teir fyrstu fremmandu hermenninir fara heimaftur, segði al-Yawar á tíðindafundi í Bagdad.

Verjumálaráðharrin, Hazem Shaalan, var samdur við forsetanum í, at tað er óðamannaverk at biðja teir fremmandu hermenninar fara úr Irak nú.

-Vit vilja ikki hava fremmandar hermenn í landi okkara, men vit hava teir fyri neyðini, til vit sjálvir kunnu verja mark okkara, segði hann.

Eygleiðarar siga við Reuter, at al-Yawar, forseti, er tann fyrsti irakski leiðarin, sum hevur nevnt, nær teir fremmandu hermenninir eiga at fara úr Irak. Amerikanska stjórnin hevur ikki gjørt nakrar viðmerkingar til orð hansara.

# 50 politikarar settir í varðhald

**Kongurin í Nepal hevur koyrt stjórnina frá. Nú er hann sjálvur stjórnarleiðari.**

NEPAL
*Árni Joensen, fartekst@mail.dk*

Nógvir andstøðupolitikarar í Nepal fjala seg, eftir at Gyanendra kongur hevur koyrt stjórnina frá og sett seg sjálvan til stjórnarleiðara.

Ein av andstøðupolitikarunum segði við AP-tíðindastovuna í gjár, at umleið 50 andstøðupolitikarar eru tiknir og settir í varðhald. Aðrir royna at fjala seg, tí tað ljóðar, at løgreglan og herurin hava fingið boð um at taka teir eisini.

Gyanendra kongur kunngjørdi í einari sjónvarpsrøðu, at hann hevði gjørt av at koyra stjórnina frá, tí hon er ikki før fyri at loysa fólksins trupulleikar, sum hann tók til. Ístaðin hevði hann skipað eina stjórn við tíggju limum og sær sjálvum sum forsætisráðhara.

Tíðindastovur, sum hava fólk í nepalska høvuðsstaðnum Katmandu, væntaðu mótmælisgongur í gjár, men myndir úr býnum hava víst, at løgreglan og herurin standa tilbúgvin. Annars er tað at kalla ómøguligt at fáa upplýsingar um støðuna í landinum, tí myndugleikarnir hava slitið alt telefonsamband við umheimin, skrivar AP.

Fleiri lond hava fordømt avgerðina hjá nepalska konginum. Í grannalandinum India sigur stjórnin, at avgerðin er ein álvarsom hóttan ímóti demokratiinum og trygdini í landinum sum heild.



*Ein nepalskur løgreglumaður kunnar seg um tað, sum hendir*

*Mynd: Reuters*